Frá Sunda kommunu:

## Starvsfólk til nýggja Dagstovnin á Oyrarbakka

Tað eru 42 børn, 7 pedagogar og 7 hjálparfólk, sum flyta frá Dagstovninum á Oyri, inn í nýggja og sera vælútgjørda stovnin á Oyrarbakka í summar, har pláss er fyri nógv fleiri børnum og starvsfólkum.

Tí verður søkt eftir pedagogum og hjálparfólkum til Dagstovnin á Oyrarbakka.
Stovnurin sum er normeraður til 94 børn í aldrinum 0-10 ár, er skipaður við 2 vøggustovum, 3 barnagarðsstovum og 1 frítíðarstovu.
Ætlanin er at taka stovnin í nýtslu 8. august, og størvini verða tí sett 8. august ella eftir nærri avtalu. Størvini verða sett við einum vikuligum tímatali millum 20 og 40 tímar.

**Hølisviðurskiftini:**
Á stovninum eru øll rúmini ljós og rúmlig, har hvør barnastova er ein sjálvstøðug vælútgjørd eind við egnari inngongd, eitt stórt felagsrúm, viðtaluhøli/serstova og ymisk verkstøð.
Økið uttanfyri er stórt við nógvum møguleikum, og stovnurin liggur sera væl fyri við møguleikum sum t.d. beint við haga og fjøru, busssambandi , fimleikarahøll og svimjihøll.

**Vit ynskja**
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum
- at tú kanst taka ábyrgd og virka í góðum samstarvi við starvsfelagaðar, foreldur og skúlan
- at tú verður við til at mynda og menna okkara pedagogiska umhvørvið
- at tú sært møguleikar og avbjóðingar, sum eru í nærumhvørvinum

**Vit kunnu bjóða**
eitt áhugavert starv, har tú saman við øðrum pedagogum og hjálparfólkum fært møguleika fyri at byggja upp eitt spennandi pedagogiskt umhvørvi á einum nýggjum stovni.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett 8. august 2005 ella eftir nærri avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at tosa við Rosu Prestá leiðara, tlf. 227852, ella Sólrún Dam, varaleiðara, á tlf. 422552/11

**Umsókn**
saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 24. juni 2005 og sendast til

**Dagstovnurin á Oyri**
**att: nýggi stovnur**
**Hornavegur 19**
**450 Oyri**

Internet Sosialurin

## Lýsing

Søkt verður eftir fólki at gera reint í Frítíðarskúlanum, sum heldur til í Missiónshúskjallaranum.

Reingerðin er 2 tímar um dagin, 5 dagar um vikuna frá 15. august 2005 at rokna.

Løn sambært sáttmála við Føroya Arbeiðarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Skrivligar umsóknir skulu sendast til Nes kommunu, 650 Toftir, í seinasta lagi 30. juni 2005 kl. 12.00.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Frítíðarskúlan tlf. 448786 fartlf. 227386.

**Nes kommuna**

## Telduarbeiði til lesandi

Á Havlívfrøðiligu royndarstøðini í Kaldbak hava vit brúk fyri einum lesandi á telduøkinum til eitt avmarkað arbeiði í summarfríðtíðini.

Talan er um at gera og laga til brúkaraflatur í databasuforritinum MS Access og arbeiði við heimasíðugerð. Annað fyrifallandi telduarbeiði kann eisini koma uppá tal.

Um tú hevur royndir innan hesi øki, set teg tá í samband við okkum.

Løn sambært avtalu.

**Havlívfrøðiliga royndarstøðin**
FO-180 Kaldbak
Tlf. 356111
Teldupostur: Mailto@havbotnur.fo

## Vágs kommuna Avloysarar

Søkt verður eftir tveimum avloysarum fyri starvsfólk í svimjihøllini í Vágs kommunu at byrja skjótast tilberð.

Ynskiligt er at umsøkjarar hava dagført lívbjargaraprógv, skeið í fyrstuhjálp ella aðrar hóskandi royndir.

Starvið er lønt samsvarandi sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Petry Joensen tlf. 373024.

Umsóknin saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Vágs kommunu í hendi í seinasta lagi 27. Juni 2005 kl. 12.00.

Umsóknin skal sendast til:

**Vágs kommunu**
FO-900 Vágur
Viðm. Avloysari

## Bakaralærlingur

Okkum tørvar ein raskan bakaralærling.

Hevur hettar tín huga so ring og spyr eftir Jóhan B. Vihelmsen.
Ring ella skriva til:

**Pf. Frants Restorff**
Tórsgøta 13 · Postsmoga 41
110 Tórshavn · Tlf. 31 10 60

frants restorff

Toyota - dele
brugte og nye
Vi sender hver dag til Færøerne
Sosialurin 341800
AABENRAA AUTOGENBRUG
TEL (+45) 74 61 41 10
FAX (+45) 74 61 41 64
www.dkauto.dk · salg@dkauto.dk

## Kappsigling

*á Sundalagsstevnuni í Hósvík sunnudagin 19. juni kl. 15.00*

Møtt verður í bátahylinum 1 tíma áðrenn.
Tilmelding fer fram hjá
Kristian Hansen 422 425 / 221 351
og hjá Agnar Olsen 422 323 / 212 323

Starvslýsingar




á portal.fo

Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |